# Jólakort við symmetri

1. Boygg eitt pappír eina ferð. Pappírið skal ikki vera ov tunt.
   Tú kanst t.d. brúka 160 g í A5-stødd.

2. Tekna eitt skap á aðra helvtina. Tekningin skal ganga heilt
   út til kantin, sum pappírið er boygt um, sí myndina.

3. Halt tær báðar helvtirnar saman og klipp skapið út.
   Skapið skal hanga saman í kantinum, sum boygt verður um.

   Kortið verður symmetriskt. Kanturin er symmetrilinja.



1. Boygg pappírið eina ferð um miðjuna.



2. Tekna eitt skap. Tekna heilt út til kantin.



3. Klipp skapið út, men ikki í kantinum.